ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 15. september 2009



Fyrstu føroyameistararnir hjá Víkingi. Gentur 10-12 ár. Standandi eru tað Hanna Olsen (venjari) Jakoba Svennsdóttir, Hansa Heinadóttir, Malena Hansen, Sigrun T. Magnussen og Gunnvá Pallson (venjari). Hukandi eru Arnborg Lervig, Bjørt Holm, Bjørk Mikladal og Yeru Yohannes

# Fyrsta FM-gullið hjá Víkingi



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

**Gentur 12 ár hjá Víkingi vunnu um vikuskiftið søguligan sigur, tá tær gjørdust fyrsta liðið hjá felagnum, sum hevur vunnið Føroyameistaraheitið**

Um vikuskiftið varð finaluumfarið í kappingini fyri gentur 10-12 ár spælt.

Nýggjur føroyameistari gjørdist Víkingur, og talan er um søguligan sigur. Hetta er nevnliga fyrsta ferðin, at Víkingur, sum varð stovnað í fjør, hevur vunnið eitt føroyameistaraheitið.

# Golfvøllur neyðugur til Oyggjaleikir

**Jesper Frigast Larsen, sum í farnu viku vitjaði hjá ÍSF, heldur tað vera upplagt við golfbreyt í Føroyum**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Jesper Frigast Larsen er úrvalsstjóri hjá danska golfsambandinum, og hann var í Føroyum sum gestur hjá ÍSF.

Hósdagin helt hann fyrilesur, har á leið 80 fólk vóru til staðar. Fyrilesturin var skipaður sum liður í føroysku fyrireikingunum til at søkja um vertsskapin fyri Oyggjaleikum í 2017.

Á fundinum upplýsti Sølvi Reinert Hansen, ÍSF forseti, at tað helst er neyðugt við golfbreyt, um Føroyar skulu gera sær vón um at hýsa leikunum í 2017. Hetta tí golf er tann ítróttin, sum hevur størsta áhugan millum limalondini í oyggjaleikahøpi.

- Áhugin fyri golf í oyggjaleikahøpi er so stórur, at vit neyvan klára at fáa Oyggjaleikirnar til Føroya, um vit ikki kunnu bjóða golf. Hetta av tí einfaldu orsøk, at vit annars ikki fáa nóg mikið av atkvøðum, tá atkvøðast skal um vertsskapin, staðfesti ÍSF-forsetin.

Í løtuni verður arbeitt við fleiri ætlanum um golfbreyt. Bæði á Glyvursnesi, í Vágum og á Sandoynni. Mett verður, at ein 18 hola breyt kostar gott og væl 20 milliónir krónur.



Golf er ein av skjótast vaksandi ítróttargreinunum í heiminum, og tí kann ein golfbreyt verða neyðug, um Føroyar skulu hýsa oyggjaleikunum í 2017

## U-landsdystir móti Grønlandi

**Føroyska U-landsliðið hjá kvinnum skal í oktober mánaði spæla fýra venjingardystir móti grønlendskum U-landsliði**

Venjari hjá føroysku kvinnunum er Claus Rasmussen, og hann hevur sent hesum spælarum boð um at møta til landsliðsvenjing.

**Úr VÍF:** Liljan Djurhuus, Agnas Olsen, Tóra Seloy, Viviann Petersen, Halla Midjord og Heidi Joensen
**Úr Tjaldur:** Sara Ann Thomsen
**ÚR VB:** Svava Vestergaard, Una Egilsdóttir og Bára Mortensen
**Úr StÍF:** Bára Berhelsen og Fríðrunn Danielsen
**Úr Stjørnuni:** Durita Ljósstein Johansen, Durita Mikkelsen, Judith Hansen og Ella Petersen.
**Úr Neistanum:** Marjun Danberg, Bára Hansen, Bára Danielsen og Ruth Mohr Heen.
**Úr Danmark:** Erla Eliasen og Ninna K. Johansen.